# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit mugu fáa palestinar at skilja, at bardagarnir í Gaza hava onga meining og tæna ongum endamáli*

*(Per Stig Møller)*

# Irakar oyðileggja moskur

**Í gjár bleiv halga moskan hjá shiamuslimunum í Samarra sprongd í luftina. Í morgun stóðu tríggjar moskur hjá sunnimuslimunum í ljósum loga**



*Gylta Moskan í Samarra er illa farin.*

Amerikanararnir og irakska stjórnin leggja dent á at forða fyri, at ófriðurin í Irak skal gerast eitt átrúnaðarligt stríð ímillum shiamuslimar og sunnimuslimar, meðan aðrar kreftir, eitt nú al-Qaeda, júst leggja seg eftir at snara ófriðinum tann vegin.

Fyribils hava hesar kreftirnar fingið sín vilja. Í gjár sprongdu ókendir menn tvey av bønartornunum á teirri halgu shiamuslimsku Gyltu Moskuni í býnum Samarra. Myndugleikarnir vóru skjótir at geva kreftum við tilknýti til al-Qaeda skyldina, og shiamuslimskir leiðarar royndu at sissa fólkið.

Kortini kom hevndin. Í morgun settu ókendir menn eld á tvær sunnimuslimskar moskur í býnum Iskandariya og eina í býnum Mahaweel. Báðir býirnir eru sunnan fyri Bagdad. Eygleiðarar stúra nú fyri, at ófriðurin í Irak kann enda sum eitt átrúnaðarligt stríð, ið kann gerast ógvuliga blóðugt.

## STUTT SAGT

### Harður jarðskjálvti

Eingin fekk skaða, tá ein harður jarðskjálvti skakaði stórar partar av miðamerikonsku londunum Guatemala og El Salvador í gjárkvøldið. Í Guatemala City vardi skjálvtin ein hálvan minutt, og fólk runnu ræðsluslig in út á gøtuna. Myndugleikarnir at flyta fólk úr nøkrum húsum, men sum sambært tíðindastovunum hendi eingin stórvegis skaði. Miðdepilin í skjálvtanum var undir havbotninum kyrrahavsmegin, men jarðfrøðingarnir siga, at miðdepilin var so langt undir havbotninum, at tað var ikki vandi fyri flóðaldu.

### Fáa nú pengar

Norðurkorea fær í dag 25 mió. dollarar, sum hava staðið á einari kontu í einum banka í Macao síðani í september í 2005, tá bankin stongdi kontuna eftir kravboðum úr USA. Amerikanararnir høvdu illgruna um, at norðurkoreanar høvdu fingið peningin við ólógligum handli, og tí bleiv avgjørt at leggja hald á teir. Herfyri játtaði Norðurkorea at steingja ein kjarnorkureaktor, men við teirri treyt, at landið fær peningin úr bankanum í Macao fyrst. Ta treytina er USA gingið undir, og í dag fær Norðurkorea peningin.

### Dýrar brøkur

Í USA krevur ein dómari heilar 54 mió. dollarar frá einum reinsaríi, tí einar brøkur, sum hann hevði latið inn til reinsingar, hvurvu. Men hann krevur meiri enn. Í vindeyganum á reinsarínum hongur eitt skelti við orðunum „einans nøgd viðskiftafólk“. Tað sigur dómarin vera villleiðandi, og hann vil hava reinsaríið dømt at gjalda 1.500 dollarar um dagin, so leingi skeltið hongur uppi, skrivar AP. Verjin hjá reinsarínum sigur krøvini vera púra burturvið.

# Toppfundur um Gaza og Libanon

**Uttanríkisráðharrarnir í Arabisku Samgonguni fara leygardagin at viðgera støðuna í Gaza og Libanon**

Tað er Egyptaland, sum hevur biðið um fundin, sum verður í Kairo. Í fyrra lagi skulu uttanríkisráðharrarnir viðgera ta spentu støðuna í Gaza-geiranum, har harðir bardagar millum vápnaðar limir í Hamas og Fatah hava kravt næstan 100 mannalív hesa vikuna.

Í øðrum lagi skulu ráðharrarnir viðgera støðuna í Linabon og serstakliga tilburðin, tá tinglimurin Walid Eido bleiv myrdur í Beirut gjáramorgunin. Hann og níggju onnur doyðu av einari bilbumbu.

Walid Eido var kendur fyri at berjast ímóti teirri stóru sýrisku ávirkanini í Libanon, og libanska stjórnin vil vera við, at sýrisku myndugleikarnir vóru við til at leggja morðið til rættis.

# Bræv um Madeleine

**Brævskrivarin vil vera við, at Madeleine McCann er framvegis í Portugal.**

Niðurlendska blaðið De Telegraf hevur fingið eitt bræv frá einum persóni, sum skrivar, at tann horvna enska gentan Madeleine McCann er í Portugal enn, og at hon er stutt frá staðnum, haðani hon bleiv rænd.

Sjálvandi kann tað hugsast, at onkur kundi gjørt sær dælt av málinum og sent blaðnum brævið, men niðurlendska løgreglan tekur brævið í størsta álvara, og tað hevur sína orsøk. Fyri einum ári síðani fekk De Telegraf eitt bræv frá einum persóni, sum skrivaði, hvar líkini av tveimum horvnum belgiskum gentum lógu. Tað vísti seg, at brævskrivarin segði satt, og tað áhugaverda er, at sambært niðurlendsku løgregluni er lítil ivi um, at sami persónur hevur skrivað brævið um Madeleine McCann.

Portugisiska løgreglan tekur eisini brævið í álvara, og væl manna løgreglulið leita nú í einum øki, sum er einar 12 kilometrar frá gistingarhúsinum, haðani Madeleine McCann varð rænd.



*Eitt bræv hevur fingið løgregluna at leita av nýggjum eftir Madeleine McCann*